## Smíða stórt víkingaskip

Nakrir norskir bátasmiðir fara nú undir at smíða tað størsta víkingaskipið, sum er smíðað í nýggjari tíð. Skipið, sum ver 35 metrar langt, og sum fer at viga umleið 70 tons, verður eftir ætlanini liðugt í 2013. Skipið verður smíðað úr eik, seglini verða einar 300 fermetrar til víddar, og pláss verður fyri einari manning upp á 100 fólk, skrivar Nordlys. Tað er ein vinnulívsmaður í Haugesund, sum hevur tikið stig til verkætlanina. Hóast skipið ikki fer í gerð fyrr enn aftan á nýggjár, hevur tað longu fingið navn. Tað skal eita Drekin Haraldur Hárfagri (á okkara máli).



## Connie segði farvæl

Connie Hedegaard var í gjár hjá Margrethu drotning á Amalienborg í sambandi við, at hon formliga legði frá sær sum ráðharri. Hesa seinastu tíðina hevur hon bara verið ráðharri fyri COP15-veðurlagsráðstevnuni, tí starvið sum ráðharri í veðurlagsmálum varð latið Lykke Friis herfyri. Connie Hedegaard viðgekk fyri fjølmiðlunum í gjár, at hon var ikki nøgd við úrslitið av veðurlagsráðstevnuni, men hon helt kortini, at Danmark hevði gjørt tað, sum til bar. Á nýggjárinum tekur Connie Hedegaard við sum tann fyrsti veðurlagskommiserurin hjá ES.

# Føroyska alivinnan setir met

ALIVINNA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*




*Sum talvan vísir, ríður útflutningurin av alifiski 10 teir fyrstu mánaðirnar í ár um 1,1 milliard*

Føroyska alivinnan setir met í ár.

Tað staðfestir Hagstovan í eini uppgerð yvir gongdina í alivinnuni og stendur á heimasíðuni hjá stovninum

Hagstovan sigur, at eftir at útflutningurin av alifiski var í hæddini fyri 7-8 árum síðani, minkaði hann nógv árini eftir 2003.

Alivinnan varð hart rakt av sjúku, og framleiðslan fall niður í ein brotpart av tí sum var framleitt frammanundan.

Men seinastu tvey árini er gongd av álvara komin aftur á útflutningin av alifiski, og nú eru nøgdirnar komnar uppá sama støði sum tey bestu árini fyrst í øldini.

Í krónum fer útflutninguin í ár tó væl uppum tað vit sóu seinast útflutningurin av alifiski toppaði.

Sostatt liggur útflutningurin av alifiski frá januar til oktober í ár og ríður um 1,1 milliard, sum tað sæst á talvuni.

### Mest heilur fiskur

Næstan 70% av laksinum fer feskur av landinum sum heilur fiskur, meðan ¼ fer sum fryst flak. Av sílum fer mestsum alt avstað sum heilur fiskur. ¾ verður selt fryst, og restin fesk. Fyri 7-8 árum síðan var myndin stórt sæð tann sama.

Seinast í nítiárunum varð eisini eitt sindur útflutt av royktum laksi, men eftir 2002 er royktur fiskur at kalla ikki útfluttur.

Tað er munur á hvør keypir síl og hvør keypir laks.

Hyggja vit at laksaútflutninginum, er USA størsti keypari í ár, meðan sera lítið av laksi er farin til USA undanfarin ár. Tað hava verið trupuleikar í alivinnuni í Kili, sum vanliga selur nógvan laks til USA, og hetta hevur so givið føroysku framleiðarunum møguleika at selja munandi meir til USA í ár.

Bretland keypir eisini nógvan laks úr Føroyum, meðan parturin sum fer til Danmarkar minkar. Fyri 7-8 árum síðan fór uml. helvtin at laksinum til Danmarkar.

Tá tað kemur til síl, hevur Japan í nógv ár verið størsti keyparin, og okkurt ári er yvir 80% farin til Japan. Í ár eru bert 19% farin til Japan. Meginparturin fer tó framvegis eystureftir, og Teivan keypir ein fjórðing av føroysku sílunum í ár, meðan Russland keypir ein fimting, sigur Hagstovan.

# Politikarar mugu sleppa út

**Hóast Kaj Leo Johannesen, løgmaður, ikki dugir at vísa á nakað ávíst, sum hann fekk burturúr, at vera á COP15, so er hann sannførdur um, at hann lærdi sera nógv og at politikarar mugu sleppa út at fáa íblástur**

COP15
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Meðan seinasta fíggjarlógarsmíðið skuldi fáast upp á pláss í Føroyum, var Kaj Leo Johannesen, løgmaður, í Keypmannahavn, har hann millum annað hitti ríkisleiðarar úr øllum heiminum.



*Tá Kaj Leo Johannesen, løgmaður, var á COP15 ráðstevnuni, hitti hann millum onnur Gordon Brown*

– Tað var eitt upplivilsi fyri lívið. Tað var sera áhugavert og læruríkt at síggja, hvussu ymiskar avbjóðingar ríkisleiðarar hava, staðfestir Kaj Leo Johannesen.

Løgmaður leggur afturat, at hann heldur tað vera sera týdningarmikið, at politakarar sleppa út í heim at hitta aðrar politikarar, tí teir kunnu geva sera nógvan íblástur.

Spurdur, hvat ávíst, føroyingar fingu burturúr at vera so mannsterkir til veðurlagsráðstevnuna er løgmaður avgjørdur.

– Eg haldi ikki, at vit vóru so mannsterk. Tað vóru nógv fleiri grønlendingar har, sigur Kaj Leo Johannesen.

### Gordon kennir Føroyar

Á túrinum í Keypmannahavn hitti Føroya løgmaður sera nógvar politikarar. Millum onnur Hillary Clinton, uttanríkisráðharra í USA, forsetan av Maldivunum og Gordon Brown, forsetisráðharra í Stóra Bretlandi.

– Gordon Brown kennir væl Føroyar. Og hann er ein av teimum, sum ikki hevur gloymt, at Føroyar komu við fiskinum undir øðrum heimsbardaga, sigur løgmaður.

Hann leggur afturat, at enski forsetisráðharrin minnist fótbóltsdystir, sum Føroyar og Skotland hava spælt.

Hartil greiðir løgmaður frá, at prátini við ymisku politikarnar vóru øgiliga stutt, men sera áhugaverd.

### Ymiskar avbjóðingar

Kaj Leo Johannesen greiðir somuleiðis frá, hvussu áhugavert tað var at fylgja gongdini í stórpolitikkinum, tí hóast mátistokkurin er ein heilt annar, so líkist tað sera nógv føroyskum politikki, har tað ofta er tíðarpress og annað press, sum gera av, at eitt úrslit kemur burturúr.

Eisini helt løgmaður tað vera áhugavert at síggja, hvussu ymiskar avbjóðingar ymisku londini hava.

– Hjá summum er tað ein spurningur at fáa mat á borðið, staðfestir løgmaður, og leggur afturat, at tað vísir seg, at føroyska samfelagið er væl fyri, og hetta er nakað, sum skal haldast fast við.